Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Samgongan tykist ósamd um fullveldið

## *Oddagrein*

ORÐASKIFTIÐ um ólavsøkurøðu løgmans í gjár avdúkaði aftur, at langt er millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin í sjálvstýrismálinum. So langt er ímillum, at politiskir eygleiðarar kunnu ikki koma til aðra niðurstøðu enn hana, at eitt greitt alternativ er til fullveldisætlanina, sum landsstýrið hevur arbeitt við í tvey ár.

FRAMSØGURØÐAN hjá tjóðveldismanninum, Heina O. Heinesen, bendi á, at Tjóðveldisflokkurin hevur start seg blindan á fullveldisætlanina. Flokkurin dugir ikki at síggja, at Fólkaflokkurin er ikki við, og at fullveldisætlanin er í dag eitt ynski hjá einum minniluta. Tjóðveldisflokkurin heldur tað framvegis vera løgið, at aðrir flokkar – t.d. Javnaðarflokkurin – ikki vil taka undir við fullveldisætlanini. Tjóðveldisflokkurin hevur áður sagt, at hann hevur slakað nógv í loysingarpolitikki sínum, men spurningurin er í dag, um vantandi medvit og konstruktivitetur ikki kann forkoma ávirkan Tjóðveldisfloksins í sjálvstýrisstremban føroyinga.

HINVEGIN ásannaði framsøgumaður Fólkafloksins greitt, at tá tað ikki eydnaðist at gera ein sáttmála við donsku stjórnina um fullveldi við skiftistíð og ynskinum um, at danskir stjórnarmyndugleikar skulu umsita fleiri málsøki fyri føroyingar í eitt ávíst áramál, so má ein nýggj kós stingast út í kortið. Hann nevndi møguleikan at gera ein sjálvstýrissáttmála, sum hevði við sær, at føroyingar yvirtaka málsøkini so við og við, samstundis sum vit laga føroyska samfelagið til veruligt sjálvstýri.

UTTAN annars at vera samd við Óla Breckmann, so vísti hann á eina konstruktiva leið, sum kann fáa breiðari undirtøku í løgtinginum og í fólkinum. Flestu føroyingar taka undir við øktum sjálvstýri og nógv stig eru tikin á sjálvstýrisleið seinastu mongu árin. Tí er tað ikki so umráðandi, at stigið – tað at staðfesta føroyska fullveldið – verður tikið við ein brest. Tað ber til at finna eina leið, sum liggur millum fullveldisætlanina og uppskotið hjá Sambandinum um ábøtur á Heimastýrislógina.

TANKARNIR hjá framsøgumanni Fólkafloksins minna nógv um uppskot Javnaðarfloksins um eina Sjálvstýrislóg. Tí skuldi verið møguligt at fingið ein skynsaman dialog millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin, miðflokkarnar og kanska eisini Sambandsflokkin – um Tjóðveldisflokkurin ikki vil vera við – um eina miðloysn, sum ein størri partur av føroysku veljarunum kann taka undir við. Eini loysn, sum gevur Føroyum fult sjálvstýri.

HÓAST Tjóðveldisflokkurin góðtekur tann viðgongda liberalistiska politikkin hjá Fólkaflokkinum, so er ikki líkt til, at hann fær allan flokkin við í fullveldisætlanina. Orðaskiftið í gjár bendi á, at samgongan tykist ósamd um fullveldisætlanina í dag!

*Sosialurin*

# Formaðurin fegnast

*Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, fegnast um, at Signar á Brúnni fekk uppreisn, men tað var neyðugt at seta nýggjan landsstýrismann, sigur hann*

EYÐUN KLAKSTEIN

Formaðurin í flokkinum hjá Signari á Brúnni fegnast um, at fráfarni landsstýrismaðurin fekk uppreisn í kanningini hjá Petur Even Djurhuus.

Men kanningin fer ikki at hava við sær, at Signar á Brúnni fer aftur í Undirvísingar- og Mentamálastýrið at starvast um landsstýrismaður, hóast Høgni Hoydal lovaði Signari á Brúnni, at varð hann reinsaður, so fekk hann landsstýrissesin aftur.

— Vit hava tikið ein aðra politiska avgerð í flokkinum, sum varð neyðug at taka, sigur Høgni Hoydal.

Hann segði annars við Sosialin 14. apríl í ár, at um Signar á Brúnni varð reinsaður, so varð støðan nullstillað, og hann skuldi í landsstýrissessin aftur.

— Tað var ein politisk meting, sum varð gjørd tá. Síðani hava vit tikið eina aðra støðu í flokkinum, tí tað var neyðugt at seta ein nýggjan landsstýrismann. Undirvísingar- og Mentamálastýrið kundi ikki liva við einum hálvum landsstýrismanni, sigur Høgni Hoydal.



*Høgni Hoydal, form. Tjóðveldisfloksins: »Flokkurin fer at viðgera málið aftur, og vit fara at nærlesa kanningina. Hon eigur at kunna brúkast til at staðfesta tær lógir og reglar, sum vit arbeiða undir*

### Signar góðtók

Signar á Brúnni hevur fleiri ferðir ført fram, at hann kennir seg sviknan av sínum egna flokki, tí nýggjur landsstýrismaður varð settur í hansara stað.

Men hetta skilir Høgni Hoydal ikki.

— Signar á Brúnni hevur altíð verið við til fundirnar, tá vit hava viðgjørt hetta málið, og hann góðtók eisini, at vit settu nýggjan landsstýrismann fyri hann, sigur Høgni Hoydal.

— Hetta málið snýr seg ikki um persónar, men um hvat er best fyri flokkin, og hvussu vit náa teimum málum, sum vit hava sett okkum fyri.

Høgni Hoydal heldur, at Signar á Brúnni hevur borið seg rætt at í hesum málinum.

— Tá løgtingsgrannskoðararnir komu við síni frágreiðing, var so stórur ivi sáddur um embætisførsluna hjá Signari á Brúnni, at tað kundu vit ikki liva við. Tí var tað rætt, at Signar fór frá, meðan málið varð kannað til botns.

— Kanningin dró tíverri út, og tí gjørdist tað neyðugt at seta ein nýggjan landsstýrismann.

### Kanningin skal brúkast

Er tað nakað í hesum málið, sum tú ert keddur av?

– Tað er harmiligt, at Signar á Brúnni hevur verið ígjøgnum hetta við nógvari umtalu í bløðunum, men tað er fegnast um, at hann er vorðin reinsaður, og hann er styrktur politiskt.

Hvat heldur tú nú skal henda í málinum?

— Tjóðveldisflokkurin fer at viðgera málið aftur, og vit fara at nærlesa kanningina. Hon eigur at kunna brúkast til at staðfesta tær lógir og reglar, sum vit arbeiða undir.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**DÁNJAL PETERSEN**
Tórshavn

andaðist mánadagin 31. juli 73 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer í dag kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Alisa, Ludvík, Bjørg og Oystein**

Tey, ið vilja minnast Dánjal, kunnu lata eina gávu til Zarepta.

**Fáa tit ikki blaðið leygardagar?**

Vinarliga ring tel. 214118, um tú sum haldari ikki fært leygardagssosialin. Boðar tú ikki frá innan kl. 15.00 leygardag, hava vit ikki møguleika fyri at bera leygardagsblaðið út.

Tíðindablaðið sosialurin

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum hava hjápt og stuðlað okkum í hesum tungu tíðum, tá okkara kæri pápi, verfaðir, abbi og familjumaður

**Arnbjørn Randrup Thomsen**

doyði og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*

**Tórhallur, Sjúrður, Høgni og Armgarð**



# Aðalstjóri: Bjørn á Heygum misskilir

*Atfinningarnar frá Bjørn á Heygum móti niðurstøðuni í Signar-málinum halda ikki. Bjørn skilir ikki millum likviditetstørv og rakstur, sigur Aðalstjórin í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum Petur Petersen.*

NICLAS JOHANNESEN

Bjørn á Heygum sær út til at standa rættiliga einsamallur við sínum atfinningum mótvegis niðurstøðuni hjá kanningarstjóranum Peturi Even Djurhuus í sambandi við Signar-málið.

Kapitalurin, sum Signar á Brúnni tryggjaði SvF, ber sambært aðalstjóran sostatt á ongan hátt boð um, at SvF harvið fekk loyvi til at hava eitt rakstrarundirskot. Kravið um eina null-loysn við árslok 31.12 var framvegis galdandi.



*Bjørn á Heygum hevur funnist rættiliga hart at kanningarúrslitinum hjá Petur Even Djurhuus*

Ein teirra, sum fílist á grundgevingarnar hjá Bjørn á Heygum í hesum máli er Aðalstjórin í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum Petur Petersen.

- Trupulleikin er, at Bjørn á Heygum blandar hugtøkini saman. Av ein hvørji orsøk gongur hann útfrá, at talan var um eina eykajáttan, sum landsstýrismaðurin játtaði SvF á sumri í 1999. Sannroyndin er, at hesar 1,6 milliónir krónurnar vórðu ongantíð játtaðar til eitt rakstrarundirskot, men til at nøkta ein gjaldføristørv, sigur Petur Petursen.

Og júst í roknskaparheiminum verður hetta mett at vera ein altýðandi munur.

### Undirskot

Víst verður frá embætismannasíðu eisini til, at almennir stovnar - eitt nú eisini ÚF - kunnu hava minus á kontoini partar av árinum, tí at árið í veruleikanum byrjar við einum nulli og ikki fyrr enn lurtagjøld osfr. byrja at koma inn seinni í árinum byrjar javnvág aftur at koma í. Kravið til stovnar so sum ÚF, SvF, Strandferðsluna og Postverkið er so, at tá árið endar - 31.12 - so skal javnvág vera í. Rakstrarúrslitið skal vera null.

Trupulleikin hjá SvF var bara tann, at ársroknskapurin fyri 1999 vísti eitt undirskot. Men tað er ein heilt onnur søga, har orsøkirnar til tess framvegis vera kannaðar.

### Væl kannað

Petur Petersen sigur, at málið um tær 1,6 millión krónurnar var á tænastmannastøði sera væl kannað, áðrenn Signar á Brúnni valdi at flyta sjónvarpinum pengar úr landskassanum.

Hann sigur, at spurningurin var til viðgerðar hjá ið hvussu er fimm ymiskum løgfrøðingum, ið komu til somu niðurstøðu: At gjaldføris-flytingin var ikki brot á stýrisskipanarlógina.

- Vit vóru heldur ongantíð í iva um, at hetta fór at vera niðurstøðan hjá kanningarstjóranum. Fyrst og fremst tí biðið verður um tøkan pening og ikki um eina eykajáttan.

Petur Even Djurhuus hevur í síni 83 síðurs frágreiðing eisini havt 15 fólk til avhoyringar.

Petur Petersen vísir í hesum sambandi eisini á, at tað framgongur, at landsgrannskoðarin Leivur Harryson tann 23. juli í fjør eisini stuðlaði landsstýrismanninum í, at ein gjaldføris-flyting var innan lógarkarmarnar.

Petur Petersen metir sostatt eisini, at niðurstøðan hjá løgtingsgrannskoðarunum um tað øvugta er grundað á eina misskiljing.

Δ



*Petur Petersen, aðalstjóri í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum sigur at Bjørn á Heygum blandar millum gjaldføristørv og rakstrarúrslit*

